# Leiðreglur fyri at veita rakstrarstuðul til mentan og list

**Yvirskipað endamál fyri mentanarstuðli Tórshavnar býráðs**

Mentanarstuðul Tórshavnar býráðs hevur til endamáls at vera við til at:

- Stuðla mentanarlívinum í allari kommuni og menna tað.
- Tryggja burðardygg arbeiðskor (fíggjarlig, menniskjalig, sosial) til tey, sum arbeiða við list og mentan í kommununi.
- Fremja eitt fjøltáttað mentanartilboð til allar borgarar í Tórshavnar kommunu.

---

**Rakstrarstuðul – mentan og list**

Stovnar og feløg, sum fáast við mentan og list, og sum uppfylla treytirnar niðanfyri, kunnu søkja um árligan rakstrarstuðul frá Tórshavnar kommunu.

Rakstrarstuðulin er býttur í tveir tættir, sum hava hvør sítt endamál og treytir, tó at sumt er felags fyri báðar:

Táttur 1: Yrkislist og mentanarstovnar

Táttur 2: Áhugalist og feløg

Játtanin fyri tættirnar er felags, men miðað verður ímóti, at í minsta lagi 20% av játtanini fer til áhugalist og feløg.

---

**§1 Endamál**

Stk. 1. Endamálini við rakstrarstuðli til yrkislist og mentanarstovnar eru:

- at tryggja listaliga og mentanarliga dygd og menning.
- at stuðla stovnum, sum eru mentanar- og listalívinum í allari høvuðsstaðarkommununi til gagns.

Stk. 2. Endamálini við rakstrarstuðli til áhugalist og feløg eru:

- at styrkja listaliga og samfelagsliga dygd, margfeldi og atgongd til mentanarlívið í Tórshavnar Kommunu.
- varðveitsla, viðlíkahald og menning av mentanararvi.

**§2 Treytir**

Stk. 1. Umsóknir um stuðul til yrkislist og stovnar verða viðgjørdar eftir fylgjandi treytum umframt treytunum í stk. 3-6.

- Dygd.*
- Menning av listagreinini ella mentanargreinini.
- Nýskapan.
- Hvussu umsóknin stuðlar uppundir visjónina, virðisgrundarlagið og viðkomandi politikkir hjá Tórshavnar Kommunu.

Stk. 2. Umsóknir um stuðul til áhugalist og feløg verða viðgjørdar eftir fylgjandi treytum umframt treytunum í stk. 3-6:

- Dygd.*
- Samfelagsligur týdningur.
- Borgaraluttøka og inklusjón.
- Hvussu umsóknin stuðlar uppundir visjónina, virðisgrundarlagið og viðkomandi politikkir hjá Tórshavnar Kommunu.

Stk. 3. Umsøkjarin skal vera staðsettur og virkin í Tórshavnar kommunu og hava havt regluligt samanhangandi virksemi í kommuni í minsta lagi fimm ár.

Stk. 4. Umsøkjarin skal hava eina hóskandi eginíløgu (t.d. frá sjálvbodnum arbeiði) ella fígging frá øðrum stuðlum, limagjøldum, sølu ella øðrum.

Stk. 5. Umsøkjarar skulu senda umsókn, sum inniheldur fylgjandi skjøl:

- Ársroknskap frá seinasta fíggjarári.
- Ársfrágreiðing.
- Virksemisætlan fyri árið, søkt verður um stuðul til.
- Fíggjarætlan fyri árið, søkt verður um stuðul til.

Stk. 6. Rakstrarstuðul – mentan og list verður ikki latin til:

- Virksemi, sum kommunan ikki hevur heimild til at stuðla sambært kommunufulltrúini (t.d. virksemi, sum ikki er til gagns fyri borgarar í Tórshavnar kommunu; vinnuligt virksemi; átrúnaðarligt ella politiskt virksemi).
- Einstakar verkætlanir.
- Almennar stovnar.
- Frítíðarvirksemi sum t.d. ítrótt og skótar (serstakur stuðulsmøguleiki er til tað endamálið).

Stk. 7. Fyri kór eru umframt treytirnar omanfyri, hesar treytir galdandi:

- Kór kunnu søkja um rakstrarstuðul á í mesta lagi 40.000kr til at løna kórleiðara.
- Kórið skal hava minst 20 virknar sangarar (undantak kann gerast fyri bygdakór).
- Kórið skal venja regluliga alt árið.
- Kórið skal framføra í Tórshavnar kommunu minst eina ferð um árið.
- Kórið skal ikki vera skúla- ella musikkskúlakór.

**Orðið “dygd” verður her tulkað í breiðastu merking, har tað ikki einans merkir góðska, men eisini virði og týdningur fyri t.d. listagreinina, mentanarlívið, borgaran, nærumhvørvið og kommununa. Tað merkir listalig dygd, samfelagslig dygd, mentanarlig dygd, og kann ikki metast uttanfyri samanhang.*

**§3 Viðgerð og freistir**

Stk. 1. Fyrisitingin viðgerð umsóknirnar og ger tilmæli um, hvør fær stuðul og hvussu nógv, og leggur hetta fyri mentamálanevndina til viðgerðar.

Stk. 2. Umsóknarfreistin er 1. august árið fyri rakstrarstuðulsárið byrjar (tvs. at 1. august 2025 er freistin fyri at søkja rakstrarstuðul fyri 2026). Umsóknir verða undanviðgjørdar í mentamálanevndini í september og endaliga viðgjørdar í januar.

Stk. 3. Miðað verður eftir at umsøkjarar fáa svar í seinasta lagi 1. februar í rakstrarstuðulsárinum.

**§4 Játtan og útgjald**

Stk. 1. Samlaða játtanin til rakstrarstuðul verður ásett í fíggjarætlanini fyri Tórshavnar kommunu og allar rakstrarstuðulsjáttanir eru treytaðar av hesum.

Stk. 2. Tey, sum fáa játtaðan rakstrarstuðul, skulu undirskriva rakstraravtalu, sum ásetur, hvørjar skyldur stuðulsmóttakarin hevur, og hvat stuðulin skal brúkast til. Avtalurnar verða gjørdar í samráð við stuðulsmóttakaran og taka støði í virksemisætlanini, sum verður send við umsóknini.

Stk. 3. Verða treytirnar í rakstrarstuðulsavtaluni ikki hildnar, kann hetta hava við sær, at partur av stuðlinum verður afturhildin, umframt at tað fær ávirkan á komandi umsóknir um rakstrarstuðul.

Stk. 4. Rakstrarstuðul verður útgoldin eftir umbøn í tveimum:

60% beinanvegin, sum stuðulin er játtaður og umbiðin.

40% tá ársroknskapur og ársfrágreiðing frá undanfarna ári eru móttikin (í seinasta lagi 1. august í rakstrarstuðulsárinum).

Stk. 5. Játtaður rakstrarstuðul, sum ikki er umbiðin í viðkomandi rakstrarstuðulsári, fellur burtur uttan ávaring.

**§5 Aðrar treytir**

Stk. 1. Mentamálanevndin kann, um serligar umstøður tala fyri tí, víkja frá ásetingunum í hesum leiðreglum.

Stk. 2. Umsøkjarar geva, við at senda inn umsókn, samtykki til, at Tórshavnar kommuna kann almannakunngera, at stuðul er játtaður.

Stk. 3. Møguligur ónýttur peningur skal rindast kommununi aftur.

Stk. 4. Álagt verður umsøkjarum, sum fáa stuðul, at tilskila á kunningartilfari og í viðkomandi samskifti, at Tórshavnar kommuna hevur veitt stuðul.

Stk. 5. Stovnar, feløg ella onnur, sum fáa rakstrarstuðul kunnu søkja um og fáa játtaðan "verkætlanarstuðul" ella "stuðul til størri listaligar verkætlanir".

Stk. 6. Hesar leiðreglur koma í gildi dagin eftir, at mentamálanevndin hevur samtykt tær.

---